# Ársfrágreiðing 2021

## Virksemi

Vinnuframi varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um Vinnuframagrunn. Endamálið hjá Vinnuframa er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun - uttan at veita rakstrar- og íløgustuðul. Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan.

Kunngerð um virksemið og umsitingina hjá Vinnuframa varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í Uttanríkis- og Vinnumálum, samsvarandi vinnupolitikki Landstýrsins, staðfestir tey vinnugreinaøki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.

Umframt omanfyrinevnda virksemi, røkir Vinnuframi hesi øki:

- Umsiting og játtan hjá Filmshúsinum
- Umsiting og játtan hjá Tónleikaútflutningsstovuni
- Umsiting  og játtan av Endurgjald til skipasmíð
- Umsiting og játtan av Endurgjald til filmsverkætlanir
- Játtan hjá Íverksetarahúsinum

Harumframt húsast skrivstovan hjá NATA, North Atlantic Tourist Association, í skrivstovuhølunum hjá Vinnuframa, og Vinnuframi eigur og rekur bygningin á Hoyvíksvegi 51, Tórshavn, sum verður leigaður út til granskingarparkina iNOVA.

## Árið 2021

Stýrið fyri Vinnuframa legði dent á at stuðla ráðgeving, menning, sølu og heildarverkætlanir í 2021.

Vinnuframi hevur í 2021, umframt kjarnuøkið í grunninum, havt ábyrgd av játtanini og umsitingini hjá Filmshúsinum og Tónleikaútflutningsstovuni (FMX), endurgjald til skipasmíð, endurgjald til filmsverkætlanir og játtanini hjá Íverksetarahúsinum.

Í desember 2019 flutti skrivstovan hjá NATA úr Vinnuhúsinum inn á skrivstovuna hjá Vinnuframa. Endamálið hjá NATA er at fremja samstarvið innan ferðavinnu millum Grønland, Ísland og Føroyar. NATA veitir stuðul til samstarvsverkætlanir innan ferðavinnumenning og -marknaðarføring og ferðastuðul til skúlar, ítróttarútferðir og mentanarlig tiltøk millum londini.

Granskingarparkin iNOVA leigar bygningin hjá Vinnuframa á Hoyvíksvegi 51. Vinnuframi hevur ábyrgd av at røkja bygningin og at gera ábøtur og umvælingar.
Í 2011 varð Løgtingslóg nr. 59 frá 26. mai 2011, um at nýta part av stovnsfænum hjá Vinnuframa til at innrætta høli til granskingarsetur, viðtikin. Bygningurin hjá Vinnuframa varð í 2012 umbygdur til endamálið fyri umleið 10 mió. kr. Starvsstovutól fyri umleið 6,6 mió. kr. vórðu eisini fíggjað við stovnsfæi frá Vinnuframa.
iNOVA leigar í dag út til vinnufyritøkur og almennar stovnar, sum hava atgongd til skrivstovuhøli og nútímans starvsstovur og starvsstovutól. Eisini kunnu fyritøkur, granskarar og privat fólk leiga køkin, ið er løggildaður av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Eitt stórt høli, Høllin, verður leigað út til kanningarstovuna Thetis Sp/f, sum byrjaði nýtt virksemi innan koronakanningar í 2020.

Vinnuframi hevur verið eygleiðari á fýra nevndarfundum hjá Nordic Innovation í 2021. Tríggir fundir vórðu hildnir á Teams. Seinasti fundurin í desember mánaða varð hildin í Helsinki.

Vinnuframi hevur verið National Contact Point fyri Horizon 2020 SME Instruments, sum er ein ES stuðulsskipan til smáar og miðalstórar fyritøkur og National Contact Point fyri Horizon 2020 ICT, sum er ein ES stuðulsskipan til loysnir innan kunningar- og samskiftistøkni. Í hesum sambandi hevur Vinnuframi havt tætt samstarv við Granskingarráðið, sum hevur havt ábyrgdina av føroysku avtaluni við ES um Horizon 2020 stuðulsskipanirnar.
Avtalan ímillum Føroyar og ES um Horizon 2020 fór úr gildi í endanum av 2020. Politiska skipanin er í ferð við at gera nýggja avtalu við ES um luttøku í nýggju ES-stuðulsskipanini, Horizon Europe, sum byrjaði í 2021.

Árið hevur verið merkt av koronafarsóttini. Øll tiltøk, sum vórðu løgd til rættis fyri 2021, vórðu avlýst vegna korona. Ætlanin var, at fara runt landið, saman við Íverksetarahúsinum og Framtak, at greiða frá Vinnuframaskipanini. Tiltakið fyri vinnuna um patent og copyright, sum skuldi fara av

bakkastokki í 2019, varð aftur avlýst í 2021. Eisini vórðu tvey skeið innan ávíkavist virkisætlan og sølustrategi avlýst.

Í samband við, at samgongan ynskir meira fokus á KT-menning í Føroyum, luttóku Vinnuframi, Íverksetarahúsið og Hugskotið á altjóða ráðstevnuni Tech BBQ í Keypamannahavn. Endamálið var at kanna, um árliga ráðstevnan Tech BBQ kann verða áhugaverd fyri útvaldar føroyskar tech-fyritøkur, sum hava tørv á vitan, netverki og vakstrarkapitali.

48 umsóknir vórðu viðgjørdar í í 2021 í mun til 36 umsóknir í 2020. Søkt varð um tkr. 5.636 í 2021 í mun til tkr. 7.515 í 2020.
Í stuðli vórðu í 2021 játtaðar tkr. 2.484 í mun til tkr. 3.089 í 2020. Afturførdur stuðul var tkr. 167 í 2021.

Rentuinntøkurnar hjá Vinnuframa vórðu tkr. 1.129 í 2021 í mun til tkr. 525 í 2020. Upprunaliga var ætlanin, at raksturin hjá Vinnuframa í stóran mun skuldi verða fíggjaður við rentuinntøkunum av stovnsfænum. Rentan í peningastovnunum í Føroyum hevur verið negativ seinastu árini. Vinnuframi hevur tí flutt meginpartin av tøka peninginum í Landsbankan, sum setir pengarnar í virðisbrøv. Virðisbrævamarknaðurin hevur tó verið óstøðugur seinastu árini og hevur tískil stóra ávirkan á tøka peningin til stuðul ár um ár.

Vinnuframi er einasti grunnur í Føroyum, ið kann játta stuðul til allar vinnugreinar, og umsóknir um stuðul verða viðgjørdar á stýrisfundi átta til níggju ferðir um árið. Áhugin fyri menning, nýskapan og útflutningi til altjóða marknaðin er stórur, bæði hjá íverksetarum og meira etableraðum fyritøkum. Játtanin hjá Vinnuframa var 3,2 mió. kr. í 2021 og hon fylgir ikki við gongdini í samfelagnum og tørvinum á fígging. Tískil er talan um fleiri áhugaverdar størri verkætlanir, sum stýrið bert kann veita avmarkaðan stuðul til. Hetta er avgjørt ein avbjóðing fyri menning og nýskapan í Føroyum.

## Framtíðin

Í 2022 fer Vinnuframi at leggja dent á at stuðla verkætlanum innan ráðgeving, menning og sølu, samstundis, sum nýggja stuðulsskipanin Heildarverkætlanir eisini kann fáa ein part av stuðlinum.

Í viðgerðini av umsóknum um stuðul, verður dentur lagdur á, at verkætlanirnar hava eitt toymi við hóskandi førleikum, sum kann tryggja, at eitt búskaparligt burðardygt virksemi við vakstrar- og útflutningsmøguleikum kann fremjast. Tað er ein fyrimunur, um verkætlanin hevur jaliga ávirkan á vinnulívið sum heild í Føroyum.

Samstarvið millum stovnarnar í vinnuframaskipanini er ein fyrimunur fyri íverksetararnar. Vinnuframaskipanin er í ferð við at menna eina heimasíða til íverksetarar. Á heimasíðuni verða allar viðkomandi upplýsingar fyri íverksetarar tøkar, til dømis um skráseting, skatt, stuðulsmøguleikar, ráðgeving við meira. Heimasíðan verður klár í 2022.

Møguleiki er fyri at gera størri tiltøk fyri bæði smáar og stórar aktørar í vinnuni. Ætlanin er, at fleiri tiltøk og skeið, sum vórðu avlýst í 2021, verða hildin í 2022.

Fyri at fylgja upp upp á verkætlanirnar, fer Vinnuframi at vitja fyritøkur, sum eru komnar á mál við teirra verkætlan. Samstundis verða smá videobrot og tíðindi av virkseminum framleidd og løgd út á heimasíðuna hjá Vinnuframa.

## Verkætlanir frá 2021

Niðanfyri verður greitt frá trimum av teimum 32 verkætlanunum, sum fingu stuðul játtaðan í 2021. Fleiri áhugaverdar verkætlanir vórðu játtaðar í árinum. Allar eru eru tó ikki komnar á mál orsakað av, at koronafarsóttin gjørdi nógv um seg seinastu mánaðirnar í árinum.

### Verkætlan 1

Umsøkjari: Pól Skarðenni

Verkætlanin í stuttum: "Pleinair retreat on the Faroe Islands".

Endamál: Endamálið er at fáa amerikanarar til Føroyar at mála pleinair, tað vil siga, at listamálarin stillar upp á staðnum frammanfyri myndaevninum og málar. Pól Skarðenni er listamálari, og kann leggja luttakarunum lag á. Málbólkurin verður í høvuðsheitum amerikanarar 50+. Samstarva verður við aðrar aktørar innanfyri ferðavinnuna í Føroyum. Hugskotið skal mennast til eina ítøkiliga virkisætlan, sum er klár at seta í verk.

Stuðul: Stýrið játtaði í 2020 stuðul sambært stuðulsskipanini 02 Ráðgeving.

Úrslit: Ítøkilig átta dagars skrá er løgd til rættis til bólkar við í mesta lagi 6-8 luttakararum. Íroknað prísinum er ferðing í Føroyum, gisting, matur, ferðaleiðari og frálæra innan listamáling.
Ferðirnar verða fyrst og fremst bjóðaðar út um várið og heystið, fyri at strekkja ferðavinnuna út á árið. Ætlanin var at bjóða fyrstu ferðirnar um heysti 2021, men orsakað av korona verður ikki byrja fyrr enn í mai 2022. Pól Skarðenni hevur tillagað konseptið og millum annað gjørt avtalu við Magenta Guesthouse í Miðvági. Marit Jóhansdóttir Magnussen, eigari av Magenta Guesthouse, verður vertur fyri gestirnar meðan tey vitja í Føroyum. Í løtuni verður leita eftir bestu kanalum at marknaðarføra 'Pleinair retreat on the Faroe Islands' til málbólkin.

### Verkætlan 2

Umsøkjari: ÍS Sp/f

Verkætlanin í stuttum: Marknaðarføring av vørum hjá ÍS. Ráðgeving og framleiðsla av grafiskum tilfari til søluátøk.

Endamál: Endamálið er at framleiða grafiskt tilfar bæði til online lýsingar og lýsingarskelti, klisturmerki og aðrar líknandi lýsingar til handlarnar, sum selja vørurnar hjá ÍS. ÍS framleiðir hálvan liturs ísar og íslagkøkur við nýggjum smakkum við mjólk frá MBM til føroyska marknaðin. Ísurin verður framleiddur í Bacalao bygninginum á Vestara Bryggju í Tórshavn.

Stuðul: Stýrið játtaði í 2021 stuðul sambært stuðulsskipanini 04 Søla.

Úrslit: Stuðulin varð brúktur til at marknaðarføra brandið ÍS og hálvan liturs ísarnar til føroyska marknaðin. Felagið, Jákup Brúsá, hevur framleitt filmsbrot og myndir til marknaðarføring á heimasíðuni, Facebook og Instagram.
Stuðulin frá Vinnuframa hevur hjálpt ÍS at náa út til fleiri handlar og brúkarar. Eisini hevur tað givið teimum meiri vitan um fyritøkuna og vørurnar og hvussu marknaðarføring virkar.

**Verkætlan 3**

Umsøkjari: Óðins Workshop ÍVF

Verkætlanin í stuttum: Eigarnir, av Óðins Workshop ÍVF, sum eru programmørar og grafikarar, menna 2-dimensionella platformer-spæli oyÐi í retrostíli til indie-marknaðin.

Endamál: Endamálið er at menna telduspælið 'Oyði'.

Stuðul: Stýrið játtaði í 2020 stuðul sambært stuðulsskipanini 03 Menning

Úrslit: Spælið verður væntandi liðugt til várið 2022. Tíðarætlanin hevur hildið væl, sjálvt um ymiskar broytingar og tillagingar eru gjørdar leypandi. Óðins Workshop framleiðir eitt retrospæl við góðsku, polering og kompleksitet, og fara at marknaðarføra seg til tey vaksnu, sum minnast hendan stílin av spølum. OoyÐi verður lagt talgilt til sølu á Steam, sum er ein online-handil fyri telduspøl. Óðins Workshop greiður frá arbeiðinum við at menna spælið í sendingini 'Lyst 48' hjá Kringvarp Føroyar, sí link her: https://kvf.fo/sending/lyst?sid=134575

# Hagtøl







| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | Samanlagt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ráðgeving | 287 | 939 | 517 | 90 | 163 | 1.996 |
| Menning | 2.444 | 1.108 | 459 | 1.973 | 1.374 | 7.358 |
| Søla | 919 | 483 | 1.467 | 620 | 647 | 4.136 |
| Heildarverkætlanir | - | - | - | 407 | 300 | 707 |
| Í alt | 3.650 | 2.530 | 2.443 | 3.090 | 2.484 | 14.197 |

